


# Brilluráð

TÁ TÚ FÆRT **BRILLUR**, LEGGJA FÓLK **BETRI** MERKI TIL TÍTT **ANDLIT**. TAÐ ER TÍ EIN **FYRIMUNUR**, UM TÚ FINNUR **JÚST** TÆR **BRILLURNAR**, SUM **FREMHEVJA** TAÐ **VAKRA** Í TÍNUM ANDLITI. MEN TAÐ ER **IKKI** ALTÍÐ SO **LÆTT** AT FINNA RØTTU **BRILLURNAR**, TÁ TÚ STENDUR Í **BRILLUHANDLINUM** OG HEVUR 7000 PØR AT **VELJA** ÍMILLUM. HER ERU **NØKUR** GÓÐ RÁÐ

***PREI:** Eygnavippurnar skulu ikki taka í gløsini. Hevur tú langar vippur mást tú boyggja tær við einum vippuboyggjara, fyri at fáa tær at boga meiri uppeftir.*

**Eyguni**
Eyguni skulu so vítt gjørligt vera mitt í breiddini á brillugløsunum. Hevur tú tøtt eygu, kunnu tey tykjast longri frá hvørjum øðrum, um tú nýtur einar brillur, sum er ljósar inni við nøsina og myrkar úti við stongina. Stongin sjálv kann eisini vera kraftig og sjónlig. Eygu, sum sita langt frá hvørjum øðrum, síggja tættari út, um tú nýtir eitt breitt stell, sum er myrkt yvir nasaryggin.

**Brýrnar**
Yvirtromin á brillunum skal fylgja skapinum á eygnabrúnum, og tað er týdningarmikið, at brýrnar heilt ella partvís síggjast undan brillunum.

***PREI:** Ert tú nærsýntur kunnu eyguni tykjast minni orskað av styrkini í brillunum. Nýt klárar, ljósar og strálandi litir til eygnaskuggarnar, so sýnast eyguni størri.*



***PREI:** Tað er stórt fokus á eygnabrýrnar, tá tú nýtir brillur. Tí er tað vakrast, um brýrnar eru vælrøktar og ikki vaksa vilt.*

**Nøsin**
Ein stutt nøs kann tykjast longri, um stykkið, sum gongur um nasaryggin, bogar upp, meðan ein long nøs tykist styttri, um nasabrúgvin gongur beint tvørturum ella er fest so niðarliga, sum gjørligt.

**Kinnbeinini**
Brillurnar skulu flukta við kinnbeinini, og tær skulu somuleiðis koma heilt út á kinnbeinini. Men tær skulu tó ikki liggja niður á kjálkarnar.

***PREI:** Ert tú langsýnt/ur virka brillurnar sum ein sjóneyka. Húðin og eyguni innanundir síggjast tí sera væl, og tí er týdningarmikið at tú gert tær ómak, um tú smyrt tær, tá allir smáir feilir síggjast sera væl. Nýt dekkstift og fjal myrkar randir og onnur frábrigdi í húðini.*

***PREI:** Um tú nýtir kinnareytt – bíða so við at busta tað á, inntil tú hevur sett brillurnar á nøsina. Tað er ikki vakurt, sum kinnareyttið fer inn um brillurnar.*

***MINST TIL:** Brillurnar siga nógv um teg og tín stíl, og tí er tað eitt gott hugskot at hava fleiri ymisk pør av brillum, sum tú kanst skifta ímillum. Tú eigur jú eisini meiri enn ein frakka ella eitt par av skóm, ha?*

***MINST TIL:** At hugsa um hvørjir litir klæða tær. Hóast brilluskapið hóskar til tín, kann ein skeivur litur á stellinum oyðileggja alt. Hugsa um litin á húðini og bið sølufólk hjálpa tær at finna fram til rætta litin.*



OVALA ANDLITIÐ hevur smala pannu, breiðari kinnbein og smøl kjálkabein. Stórt sæð allar brillur rigga til hetta andlitsskapið – men ansa eftir brillum við alt ov grafiskum sniði.



FÝRHYRNTAÐ ANDLITIÐ er umleið eins breitt tvørturum pannuna, kinnbeinini og kjálkabeinini. Her riggar tað væl við breiðum brillum.



TRÝHYRNTA ANDLITIÐ hevur breiða pannu, breið kinnbein og smøl kjálkabein. Høkan kann tykjast spísk og andlitið er ofta lítið. Brillurnar skulu ikki vera ov breiðar, og rundar brillur rigga ofta væl til trýkantaða andlitið.



DROPASKAPAÐA ANDLITIÐ hevur smala pannu og breið kjálkabein. Hesum skapinum klæðir best at hava stórar og breiðar brillur, sum skapa fyllu í ovara partinum av andlitinum.

***PREI:** Ivast tú í hvat andlitsskap tú hevur, kanst tú tekna skapið á spegilið við eini tussj ella eini varrastift.*